# Frá frælsisyvirlýsing til nýggja

TINGHELLUKRONIKKIN

Í hesi grein verður greitt frá stríðnum millum amerikumenn og bretar, Frælsisyvirlýsingini, fyritreytunum fyri teirri amerikonsku stjórnarskipanini og tilevningini av teirri nýggju skipanini. Eisini verður víst á, at tann amerikanska stjórnarskipanin hevur havt stóra ávirkan á stjórnarskipanir kring heimin

RÚNI RASMUSSEN



## Ónøgd niðursetufólk

Byrjanin til ta amerikonsku sjálvstýristilgongdina skal síggjast í ljósinum av, at bretar mettu, at tað var neyðugt at skatta koloniirnar fyri at kunna fíggja umsitingina av teimum. Bretska krúnan legði eina røð av skattum á koloniirnar, men mótstøðan var hørð og umfatandi. The East India Company fekk einarætt frá bretsku stjórnini at flyta te úr Kina beinleiðis til síni umboð í Amerika, og hetta førdi við sær, at niðursetuhandilsmenninir ikki fingu lut í hesum lønandi handli. Tann 16. desember í 1773 skipaðu nøkur niðursetufólk fyri sokallaðu "Boston Tea Party" sum eitt mótmæli ímóti bretsku atferðini. Hetta gjørdist byrjanin til harða stríðið millum niðursetufólkið og bretsku ta stjórnina. Bretar kravdu frið og landaskil, men amerikumenn kravdu frælsi.

## Frælsisyvirlýsingin og kríggið við bretar

Í september í 1774 varð stevna hildin í Philadelphia, sum nevndist First Continental Congress. Allar koloniirnar uttan Georgia sendu umboð til stevnuna. Endamálið við stevnuni var at bøta um sambandið við ta ensku stjórnina, men hetta eydnaðist ikki, og í apríl mánaði í 1775 vóru niðursetufólk í Massachusetts í bardaga við bretar við Concord og Lexington. Kollveltingin var byrjað. Stríðið spjaddist og uppreistur var veruleiki, og krav um fullveldi varð endaliga orðað 4. juli í 1776 í tiltiknu Frælsisyvirlýsingini (Declaration of Independence), ið staðfesti natúrrættindi hjá mannaættini og fullveldið hjá teimum amerikonsku statunum. Thomas Jefferson orðaði yvirlýsingina, sum í stóran mun er grundað á tey politisku ástøðini hjá enska heimspekinginum John Locke.

Frælsiskríggið vardi longri enn væntað. Tað byrjaði 19. apríl í 1775 og endaði 19. oktober 1781, tá ið Lord Cornwall við heri sínum gav seg yvir í Yorktown, Virginia. Bretar, sum eisini vóru í kríggi við fleiri evropisk lond, máttu lúta fyri frælsishugaðu niðursetufólkunum. Í 1983 viðurkendi Bretland fullveldið hjá teimum 13 koloniunum.

## Samgongusáttmálin

Meginlandsstevnan (Continental Congress), sum var sett saman av umboðum frá øllum statum, viðurkendi í november í 1777 Articles of Confederation, ið komu í gildi í mars 1781 eftir at statirnir høvdu góðtikið skjalið. Samgongusáttmálin ásetti sambandið millum einstøku statirnar og nýggju meginstjórnina. Sáttmálin staðfesti, at statirnir vóru sjálvstøðugir og at meginstjórnin einans var ein miðil hjá statunum at ráða og stýra í samstarvi (sokallað konfederatión).
Óttin fyri eini sterkari meginstjórn, eins og tann bretska, er endurspeglaður í samgongusáttmálanum. Alt valdið var hjá kongressini, sum var sett saman av umboðum frá statunum. Tann nýggi sáttmálin og tann nýggja stjórnin høvdu sínar veikleikar. Eingin forseti var, einki tjóðardómsvald var, og kongressin hevði ikki rætt at áleggja skatt, men noyddist at biðja um pening frá statunum. Tingið hevði heldur ikki rætt at stýra handli. Tað var næstan ómøguligt at bøta um veikleikarnar, tí broytingar kundu einans fremjast, um allir trettan statirnir atkvøddu fyri broytingunum.

## Tørvur á eini nýggjari skipan

Krøv um broytingar var úrslit av eini maktarleysari meginstjórn og búskaparkreppu í 1780-árunum. Fleiri politiskir leiðarar mettu, at trupulleikarnir í 1780-árunum vóru úrslit av veikleikunum í samgongusáttmálanum, serliga vantandi evnini hjá meginstjórnini av fáa skil í lag í fleiri statum. Um støðuna segði James Madison:

"That our governments are too unstable, that the public good is disregarded in the in the conflicts of rival parties, and tha measures are too often decided, not according to the rules of justice and the rights of the minor party, but by superior force of an interested and overbearing majority."

Sambært Madison, sum av fleiri verður mettur at vera faðir at teirri amerikonsku stjórnarskipanini, og øðrum var loysnin at seta eina nýggja meginstjórn á stovn og at smíða eina nýggja stjórnarskipan. Hann metti, at neyðugt var at seta á stovn eina sterka samveldisstjórn, men hann bar ótta fyri, at ein sterk samveldisstjórn kundi misnýta valdið og fremja ágang ímóti borgarunum. Tí var neyðugt, í teirri nýggju skipanini, at tryggja, at valdið ikki varð miðsavnað. Fyri at forða fyri valdsmiðsavnan og valdsmisnýtslu, skuldi tann politiska skipanin býtast í tríggjar partar: tað lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið. Eitt slíkt valdsbýti var alneyðugt sambært Madison. Í hesum sambandi er hóskandi at endurgeva hesi beinraknu og kendu orð Madisons úr The Federalist Papers (nummar 51):"If man were angels, no government would be necessary."

## Stjórnarskipanarstevnan í Philadelphia

Í 1786 bjóðaði Virginia statunum til stevnu í Annapolis fyri at endurskoða og betra um handilsviðtøkur. Umboð frá einans fimm statum møttu upp. James Madison og Alexander Hamilton vóru millum umboðini. Seinni høvdu hesir avgerandi ávirkan á stjórnarskipanarsmíðið. Stevnan samtykti at kalla saman til stevnu árið eftir í Philadelphia. Tólv av trettan statum møttu upp í mai mánaði í 1787. Nógv vitborið fólk var savnað. Nógvir høvdu høga útbúgving og fleiri dugdu væl latín og grikskt. Stevnan varð hildin, fyri afturlatnum hurðum, frá mai til september. Høgt virdu leiðararnir Benjamin Franklin og George Washington tóku lut í stevnuni; og var Washington einmælt valdur til stevnuforseta, men veruliga leiðslan kom frá einum lítlum bólki av ídnum tjóðskaparmonnum: Alexander Hamilton frá New York, James Madison frá Virginia og James Wilson frá Pennsylvania.

## The Great Compromise

Ta fyrstu vikuna legði Edmund Randolph frá Virginia uppskot fram, sum James Madison hevði tilevnað, við broytingum, sum kundu koma ístaðin fyri ta veiku samgonguna av statum og seta á stovn eina dygdargóða meginstjórn heldur enn at endurskoða samgongusáttmálan (Articles of Confederation). Umboðini vóru samd um at skifta orð um uppskotið, ið nevnist Virginia-ætlanin. Endamálið við ætlanini var at skapa eina sterka meginstjórn. Lóggávutingið skuldi hava vald at kolldøma statslógir. Nýggja stjórnarskipanin skuldi geva stjórnini størri myndugleika yvir statunum og fólkinum. Stjórnarvaldið skuldi býtast í

